## 29 konur og 58 børn

Dómsvaldið í ísraelska býnum Tel Aviv fór í morgun undir rættarmálið ímóti leiðaranum í einum átrúnaðarbólki. Sambært ákæruvaldinum hevur maðurin, tann 60 ára gamli Goel Razon, 23 konur, sum hann hevur fingið 59 børn við. Hann er nú ákærdur fyri neyðtøku og burturflyting og fyri at hava billað konum sínum inn, at hann var altvaldandi og hevði guðdómliga megi. Ísraelska ákæruvaldið sigur, at Goel Razon giftist fyrstu ferð í 1972. Fyrst í áttatiárunum fekk hann sær eina konu afturat, og síðani 1991 er hann giftur 21 ferðir afturat. Hann noktar seg sekan í øllum ákærum.



## Genturnar vælkomnar

Italski forsætisráðharrin, Silvio Berlusconi, ber orð fyri at vera rættiliga avgjørdur og opinskáraður, sama hvat evnið er. Soleiðis var eisini, tá hann hitti albanska forsætisráðharran um vikuskiftið. Á einum tíðindafundi aftaná segði Berlusconi, at teir báðir vóru á einum máli um, at Italia hevur fullan rætt til at senda flóttafólk úr Albania heimaftur. Hann legði tó afturat, at hann hevði sagt sínum albanska starvsbróðuri, at tær vøkru genturnar í Albania eru vælkomnar til Italia. Hesi seinastu orðini hava fingið øði í italsku andstøðuna, skrivar Reuters úr Rom·

# Tindur riggaður til snelluveiði

**– Tað eru ikki so nógvir snellubátar eftir, og eg vænti, at vit hava ein møguleika at fáa raksturin at hanga saman, sigur Dánjal Jacobsen, sum hevur flutt línudagarnar hjá Skørini yvir á fyrrverandi trolbátin Tind, sum nú verður riggaður til snelluveiði**

UMLEGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*Myndir: Birgir W. Høgnesen*

Fyri umleið hálvum øðrum ári síðan endaði trolbáturin Tindur í Vestmanna. Báturin var í nógv ár heimahoyrandi á Strondum, har hann varð rikin sum trolbátur.

Tá Dánjal Jacobsen og synir hansara keyptu Tind saman við Bjarna Kass, vórðu troldagarnir tiknir av bátinum, soleiðis at hann einki trolloyvi hevur longur.

Bjarni Kass keypti tveir triðingar av døgunum, og seinasti triðingurin varð fluttur yvir á trolbátin Skálafoss, sum Dánjal Jacobsen eisini er reiðari á.

### Á snelluveiði

Dánjal Jacobsen sigur, fyrrverandi trolbáturin av Strondum nú verður riggaður til snelluveiði.

– Vit keyptu línubátin Skørin, sum átti einar 106 línudagar. Skørin er seldur til upphøggingar í Danmark. Hesir umleið 106 línudagarnir kunnu tvífaldast sum snelludagar, og tað merkir, at tá Tindur fer at fiska við snellu, verður dagagrundarlagið undir bátinum góðir 200 fiskidagar.

Reiðarin heldur, at hetta er eitt hampiligt tal hjá einum báti sum Tindi.

Spurdur, um hann væntar, at tað fer at loysa seg at reka Tind á snelluveiði, sigur Dánjal, at tað væntar hann.

– Tað eru ikki so nógvir snellubátar eftir, og eg vænti, at vit hava ein møguleika at fáa raksturin at hanga saman.

Hann vísir á, at veiðan við snellu í fyrsta lagi verður upsi.

– Tindur hevur framhaldandi línuloyvi, men sum er, ætla vit bara at fiska við snellu, leggur hann aftrat.

### Enn ein tíð

Dánjal Jacobsen sigur, at tað fer at taka eina tíð enn, áðrenn Tindur verður klárur at loysa og fer á snelluveiði.

– Vit skulu taka trolspøl og annað úr bátinum, sum síðan verður riggaður til snelluveiði.

Hann heldur ikki, at tað er so ógvuliga nógv, sum skal gerast, men væntar kortini ikki, at Tindur loysir enn.

– Vit hava ikki so góðar stundir at gera tað, sum gerast skal, og tí fer tað bara at taka ta tíð, tað tekur, leggur Dánjal aftrat.

Hann sigur, at enn er eingin manning sett til bátin.

– Tindur er nú málaður litin á okkara bátum, og hevur nú sama lit, sum Skálafossur, Vesturbúgvin – og Eysturbúgvin, sigur Dánjal Jacobsen.

Skjótt verður Tindur flotaður, og síðan verður hann riggaður til, meðan hann liggur við bryggju.




*Tindur var bláur, men hevur nú fingið somu litir sum Vesturbúgvin, Skálafossur – og Eysturbúgvin*

# Dánjal vildi hava skipini lægri og longri




*Trolbáturin Skálafossur við bryggju í Vestmanna*

*Mynd: Birgir W. Høgnesen*

SKIPSLITIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

At Eysturbúgvin, sum hevur heimstað í Húsavík, hevur sama lit sum Vesturbúgvin, hevur sína søgu.

– Eysturbúgvin og Vesturbúgvin vórðu bygdir á Tórshavnar Skipasmiðju um somu tíð. Tá litir skuldu setast á skipini, og skipasmiðjan kom við sínum uppskotum, dámdi mær tey ikki. Eg helt, at skipini tóktust so stutt og høg við teimum litum, sum vóru í uppskoti.

Tað sigur Dánjal Jacobsen, reiðari.

Hann fór síðan at hyggja at, hvørjar litir hann kundi hugsað sær, at skipini høvdu.

– Eg vildi, at Vesturbúgvin skuldi síggja longri út og ikki tykjast so høgur, sum hann gjørdi við teimum litum, sum vóru í uppskoti – og eg haldi, at hetta eydnaðist.

Spurdur, hví Eysturbúgvin, sum er heimahoyrandi í Húsavík, fekk sama lit, sum skipini hjá honum, synum hansara og Helga Iversen, sigur Dánjal Jacobsen:

– Teir, sum lótu Eysturbúgvan smíða, spurdu, um teir kundu brúka sama lit sum vit, og sjálvandi var tað í lagi.

Reiðarin sigur, at Eysturbúgvin varð hin fyrsti, sum soleiðis fekk litin, ið hann hevði skotið upp.

– Jú, mær dámar litin væl, og nú hevur so eisini Tindur fingið sama lit, sum Eysturbúgvin og Vesturbúgvin fingu fyri út við 20 árum síðan, sigur Dánjal Jacobsen, reiðari.

Dánjal Jacobsen, synir hansara og Helgi Iversen eiga saman partrolaran Vesturbúgvan, trolbátin Skálafoss og komandi snellubátin Tind.

Saman við Tummasi Christophersen eigur Dánjal Jacobsen eisini partafelagið Vár, ið nú eigur partrolararnar Nónhamar og Fjalshamar, sum teir keyptu frá P/F Christiani í Grótinum í Klaksvík. Teir áttu Nornagest og Kolumbus saman, men hesir eru nú lagdir, og loyvini eru flutt yvir á Nónhamar og Falshamar.